## Spæla í Sarpugerði

Ein av spurningunum, sum ofta verður havdur á munni til samanleggingar, er, hvar heimavøllurin hjá nýggja felagnum skal verða. Tann spurningin hava kommununar í Gøtu og Leirvík tó longu greitt. Við samanleggingini av kommununum varð avrátt, at tær íløgur, sum skulu gerast fyri at halda fast um FSF-góðkenningina av vøllinum, verða gjørdar í Gøtu. So tað verður í Sarpugerði, at Formula-liðið hjá nýggja felagnum fer at halda til.



## Uppskot um búmerki

At finna og sniðgeva ein nýggjan samleika verður ein av fyrstu uppgávunum hjá fyrstu nevndini í GÍ/LÍF. Ikki er óhugsandi, at hetta verður gjørt við at útskriva kapping, men longu mánakvøldið var okkurt uppskotið um hetta lagt fram. Láturin var í øllum førum stórur, tá hendan tekningin við einum skurðá, ið ber ein rosinupakka á bakinum, varð sýnd fyri aðalfundinum.



*Til samans vóru 202 fólk møtt á aðalfundunum hjá GÍ og LÍF*
*Mynd: Jonhard Hammer*



*Nýggja nevndin í felagnum standandi Tórhallur Justinussen, Jógvan Júst Olsen, næstformaður, Ólavur Olsen og Páll Gregersen, formaður. Húkandi eru Andreas Poulsen og Hanna Olsen, ið syrgir fyri, at nakað av javnstøðu verður í nevndararbeiðinum*

## Eingin ivi um samanlegging

**Í Leirvík atkvøddi ein einmæltur aðalfundur fyri, og í Gøtu var talan um greiðan meiriluta**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Limirnir vóru ikki í iva, tá teir í gjárkvøldið skuldu taka støðu til endaliga uppskotið frá nevndunum í GÍ og LÍF um samanlegging.

Fyrr í vetur vórðu aðalfundir hildnir, har limirnir púrasta greitt viðmæltu, at nevndirnar arbeiddu víðari við ætlanunum um at leggja feløgini saman. Og nú endaliga uppskotið fyrilá, vóru limirnir als ikki í iva.

Í Leirvík vóru 56 limir á fundi, og hvør sum ein atkvøddu hesir fyri eini samanlegging. Helst so stór var undirtøkan í Gøtu, men har var tó heldur eingin ivi. Av teimum 146, sum greiddu atkvøðu, vóru 132 fyri. 12 atkvøddu ímóti, meðan tvær atkvøður vóru blankar.

So samlaða úrslitið var, at av 202 limum vóru 188, sum atkvøddu fyri eini samanlegging, so tað er ikki tann minsti ivin um, at hetta var úrslitið, sum fundarfólkið vildi hava.

# Skiparin fer til skips

**Tað verður ikki Sámal Joensen, sum skal stýra samanløgdu GÍ/LÍF-skútuni. Hjá honum verður talan ístaðin um kjans við Mærsk-flotanum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er eingin ivi um, at flestu viðhaldsfólkini hjá nýggja felagnum høvdu vónað, at Sámal Joensen fór at taka eitt tørn afturat á miðvøllinum, nú GÍ og LÍF hava kastað saman.

Sum so var hetta eisini tað, sum var sett í kortið, men umstøðurnar hava kortini gjørt, at felagið nú má klára seg uttan stýrimannin á miðvøllinum.

- Eg hevði boðað frá, at helt eg fram við fótbóltinum, so bleiv hetta í GÍ. Eg eri tó liðugur við útbúgving mína sum skipsførari, og nú havi eg fingið kjans at sigla við Mærsk. Og tað er ein møguleiki, sum eg ikki kann lata frá mær uttan víðari, sigur Sámal.

So ístaðin fyri Formulabólt við GÍ/LÍF, verður talan nú í mesta lagi um hugnabólt av onkrum slag, tá siglingartíðin lagar tað so, at Sámal er heima til dystir.



*Sámal Joensen er í dag 32 ára gamal. Í Føroyum hevur hann bert spælt fyri GÍ, men eitt árið spældi hann saman við fleiri øðrum føroyingum í íslendska Leiftur. 25 ferðir hevur hann spælt á føroyska landsliðnum.*